Jóannes Jacobsen, búskaparfrøðingur:

# Tað almenna skal halda seg langt burtur



*Tað er rættiliga óhugsandi, at peningastovnarnir ikki hava vart síni áhugamál, tá teir í síni tíð veittu alivinnuni lán. Peningastovnarnir vistu, at alivinnan var ein bust-boom vinna, og tískil hava teir helst sett stóra rentu á lánini, sum teir hava veitt alivinnuni, sigur Jóannes Jacobsen, skrivari í Búskaparráðnum*

*Mynd: Savnsmynd*

**Tað hevur rættiliga lætt at hildið aftur við almennum stuðli, tí búskapargongdin hevur verið rættiliga positiv síðan kreppuárini, og tørvur hevur ikki verið á almennum stuðli. Tað ger tað ikki minni týdningarmikið, at politisku myndugleikarnir halda fast um stuðulsfríu leiðina, sum varð sett eftir kreppuna í nítiárunum, sigur Jóannes Jacobsen, skrivari í Búskaparráðnum**

SAMRØÐA UM KREPPUNA Í ALIVINNUNI
*Páll Holm Johannesen*

Seinastu tíðina hevur kreppan í alivinnuni rættiliga verið í andglettinum í fjølmiðlunum. Fyrsta gølan var, tá Bakkafrost varð ákært av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni fyri at taka og útflyta ILA- raktan fisk á evropeiska marknaðin.

Sum at leggja stein á byrðu hjá alivinnuni hava stjórarnir í peningastovnunum úttala seg í fjølmiðlunum um, at vinnan so dánt megnar at hóra undan, og tað er alneyðugt við kapitalinnskoti. Stjórin í Føroya Banka segði m.a í samrøðu við Sosialin, at eginpeningurin hjá alifyritøkunum er við at verða etin upp av ringu aliprísunum. Í løtuni er prísurin 13-14 krónur fyri kilo, meðan framleiðslukostnaðurin liggur á góðum 20 krónum.

Í kjalarvørrinum av kjakinum um kreppuna í alivinnuni hava møguleikarnir verið nevndir fyri, at tað almenna møguliga kann veita kreppuraktu alivinnuni eina hjálpandi hond. Umboð fyri flestu politisku flokkarnar vístu tó hesum møguleikanum aftur í týsdagssosialinum. Í samband við stóru kreppuna í alivinnunu hava vit sett Jóannes Jacobsen, búskaparfrøðing og skrivara í Búskaparráðnum, stevnu um leiklutin hjá tí almenna, ringu støðuna hjá peningastovnunum og hvørjar avleiðingar kreppan í alivinnuni hevur fyri føroyska samfelagið.

### Tað almenna halda seg burtur

Jóannes Jacobsen er rættiliga avgjørdur, tá hann verður spurdur um, tað er rætt at veita alivinnuni almenna hjálp.

– Eftir stóru búskaparkreppuna fyrst í nítiárunum varð frá almennari síðu settir nýggir vinnupolitiskir reglar, sum meldaðu greitt út fyri vinnulívinum, at eingin almennur stuðul varð veittur í framtíðini. Higartil hevur verið rættiliga lætt at hildið aftur við almennum stuðli, tí búskapargongdin hevur verið so positiv, og tí hevur ikki tørvur verið á almennum stuðli. Nú krepputekin eru at hóma í ávísum vinnum, er tað alneyðugt, at tað almenna megnar at halda fast um stuðulsfríu leiðina frá kreppuárunum, sigur ein avgjørdur Jóannes Jacobsen.

Skrivarin í Búskaparráðnum leggur stóra áherðslu á, at tað almenna má verða konsekvent viðvíkjandi almennum stuðli. Hann er samdur við Kristinu Háfoss, sum fyrr í vikunifórdi fram í Sosialinum, at letur man fyrst dyrnar á glopp fyri stuðli, so er rættiliga lætt at enda í somu støðu sum í áttatiárunum, tá stuðulsbylgjan til vinnulívið var í hæddini.

- Vit kunnu samanbera við støðuna, danir vóru í 80 árunum. Gjøgnum øll 70 árini devalueraðu danir ferð eftir ferð, men tá Poul Schlüter kom til valdið setti hann sær fyri at tryggja dønum ein fastan valuta. Hóast stjórnin fleiri ferðir var undir stórum trýsti at devaluera, so hildu teir konsekvent aftur, sjálvt um teir upp á stutt sikt møguliga høvdu fingið gagn av eini devaluering, greiðir Jóannes Jacobsen frá.

Hann nýtir dømið um Schlüter-stjórnina sum eina fyrimynd hjá politiska myndugleikanum í Føroyum um at vera konsekventur, hóast trýst er á. Jóannes vísir á, at tað er ómetaliga týdningarmikið, at tað ikki verður tikið støðu frá máli til máls, sum onkur politikkari hevur nevnt, men at tað er ein greið linja viðvíkjandi almennum stuðli.

– Tað er av ómetaligum stórum týdningi yvirfyri vinnulívinum, at tað almenna hevur ein konsekventan politikk, tí fær vinnulívið ikki greið boð, so er skjótt, at tað roynir at gera sær dælt av møguleikanum at ogna sær almennan stuðul. Vinnulívið má fáa greitt at vita, at tað er vinnulívið sjálvt sum skal reka vinnulív, og ikki tað almenna. Fær vinnulívið ikki fastar karmar at halda seg til, so er vandið fyri, at tað fer at taka størri váða, enn tað átti, tí tað veit, at tað er ein møguleiki, at tað almenna tekur um endan, um tað ikki gongur, og í tí støðuni mugu vit fyri alt í verðini ikki enda í, sigur ein avgjørdur Jóannes Jacobsen.

### Peningastovnarnir vunnið pening

Spurdur um, hvat hann heldur um neyðarrópini frá peningastovnunum um, at hjálp má veitast alivinnuni alt fyri eitt, svarar Jóannes, at bæði Føroya Banki og Føroya Sparikassi, sum báðir fíggja stóran part av alivinnuni, hava vunnið nógvan pening í alivinnuni seinastu árini.

– Astrup nevnir tað sjálvur í greinini, at alivinnan er ein bust-boom vinnan( ein vinna við stórum sveiggjum blðm,), og tískil er rættiliga óhugsandi, at teir báðir fíggjarstovnarnir ikki hava vart síni áhugamál, og sett eina høga rentu til tey lán, teir veitt alivinnuni. Eftir mínum tykki ber tað tí ikki so væl til at rópa um hjálp, tá teir eftir øllum at døma hava vunnið nógvan pening úr alivinnuni, sigur skrivarin í Búskaparráðnum.

Til kjakið hvørt fíggjarstovnar skulu hava heimild til at taka pant í aliloyvum, metir Jóannes, at tað er ein heldur løgin hugburður frá almennari síðu at nokta fíggingarstovnum at fáa pant í aliloyvum.

– Politiska grundgevingin fyri ikki at heimila fíggingarstovnum at taka pant í aliloyvunum hevur verið, at man ikki vil hava, at fíggingarstovnarnir seta seg á alivinnuna, men kortini bendir nakað á, at fíggingarstovnarnir kortini hava stórt vald. Hóast alifyritøkur eru so illa fyri fíggjarliga, at tær áttu at farið á húsagang, so halda fíggingarstovnarnir kortini lív í fyritøkunum, tí teir vilja ikki missa aliloyvið. Úrslitið av lógini verður tí fullkomiliga mótsatt tí, sum lógin leggur upp til, heldur búskaparfrøðingurin.

### Ikki nøkur stór samfelagskreppa

Seinastu vikurnar hevur verið róð frammundir, at fer alivinnan av knóranum, so kann tað hava ræðandi avleiðingar fyri føroyska samfelagið. Í løtuni eigur alivinnan góð 23% av samlaða føroyska útflutninginum, men kortini vantar Jóannes, at kreppan í alivinnuni verður sett í rætt perspektiv.

– Tað er í so nógv sagt, at kreppan kann hava ræðandi avleiðingar fyri føroyska samfelagið. Í fjør vóru í alt 160 milliónir goldnar í lønum í alivinnuni, og tað svarar til 2,7 % av samlaðu lønarútgjaldingunum í Føroyum í fjør, og tískil skal kreppan setast í eitt rætt perspektiv. Latið okkum siga, um helvtin av alifyritøkunum fer á heysin, so svarar tað til um 1,3 % av lønarútgjaldingunum í Føroyum, og tað er ikki nakað ræðandi tal. Sjálvsagt er tað ómetaliga óheppið hjá teimum fólkunum, sum møguliga missa teirra arbeiði, og tað er einki at ivast í at tað er ein stórur trupulleiki fyri sjálva alivinnuna, men hyggja vit uppá samfelagsbasis, so er ikki talan um nakra ræðandi kreppu, sigur Jóannes Jacobsen

Skrivarin í Búskaparráðnum vísir eisini á, at arbeiðsloysið í Føroyum ongantíð hevur verið so lágt sum júst nú, og missa fólk arbeiði, so er góður møguleiki fyri at tey kunnu fáa arbeiði í øðrum vinnum. Jóannes vónar sjálvsagt ikki, at støðan verður so hættislig at fólk missa arbeiðið, og sigur at enda, at hann vónar, at alivinnan fer at megna at hóra undan.



*Búskaparfrøðingurin, Jóannes Jacobsen, sigur, at tað almenna skal halda seg burtur frá stuðla alivinnuni. Tað er av stórum týdningi, at hildið verður fast sum stuðulsfríu leiðina, sum varð sett út í kortið eftir kreppuna.*

*Savnsmynd*



# Yvirlæknin øtast um grindaørskap

**Ongin samanhangur kann ávísast millum aggressivitet og kyksilvur, staðfestir Pál Weihe, yvirlækni. Hann øtast um eina læknaliga grein í Ugeskrift for Læger, sum ábendir, at føroyingar eru villari enn onnur fólkasløg, tí vit hava nógv kyksilvur í blóðinum**

GRINDADRÁP
*Ingi Rasmussen*



*Læknar fáa beinanvegin illgruna um, at alt ruggar ikki rætt, sigur Pál Weihe um grein í Ugeskrift for Læger, ið blóðdálkar føroyingar*

*Mynd: Jens K. Vang*

Sum føroyingur og kyksilvurkønur má eg bara taka meg til høvdið.

So bersøgin er Pál Weihe, yvirlækni í arbeiðsmedisini, um greinina í Ugeskrift for Læger frá 14. juli, sum Sosialurin viðgjørdi mikudagin. Pál Weihe hevur snøgt sagt onki til yvirs fyri greinini, sum Claus Hancke, serlækni í almennum medisini, hevur skrivað. Í greinini vísir danski læknin á ein fyrilestur, sum Dr. Richard Fischer helt í USA fyri einum góðum mánaði síðan, har sagt varð, at høga nøgdin av kyksilvuri í føroyingum er orsøk til eina aggressiva atferð, sum sæst aftur í grindadrápi.

– Møsn uttan vísindaligt innihald, sigur Pál Weihe. Eg havi fingist við gransking av kyksilvuri síðan 1985, og tað skuldi verið løgið, um eg ikki visti tað, men vit hava ongantíð sæð nakað samband millum atferð og kyksilvur. Hvørki í okkara kanningum ella bókmentum.

### Millum tveir stólar

Pál Weihe finst at Ugeskrift for Læger fyri yvirhøvur at hava tikið greinina upp. Hon lýkur ikki tey vanligu minstukrøv, sum mugu setast til greinar í einum seriøsum fakligum tíðarriti. Eitt minstamát má vera, tá pástandir verða lagdir fram, heldur hann – serliga um teir eru so kollveltandi, sum hendan greinin leggur upp til. Men onki verður nevnt um, hvussu ráðstevnan eitur, hvør Dr. Fischer er, ella hvørji prógv lógu til grund fyri útsøgnum hansara.

– Greinin í Ugeskrift for Læger setir seg ímillum tveir stólar. Um Hancke ikki dámar, at føroyingar drepa grind, so er tað í lagi, men hví hevur tað týdning fyri okkara tíðarrit? Um hann hinvegin hevur ein medisinskan boðskap, so skal hann føra rímiliga væl grundað prógv, men tað er als ikki hansara ørindi. Hann heldur bara, at grindadráp er barbariskt, og tað er mær ein gáta, hví brævið er sloppið við yvirhøvur, sigur Pál Weihe.

### Misnýtslan ber til

Sjálvur óttast Pál Weihe ikki fyri, at tað er teirra eftirhondini heimskenda gransking við grind og kyksilvuri, sum er misnýtt í hesum føri til at brúka ímóti føroyingum.

– Tú kanst ongantíð verja teg ímóti, hvat verður sagt á einum vertshúsi. Tað ber ikki til at verja seg ímóti, at tín gransking verður misnýtt og tikin úr sínum rætta samanhangi, men við okkara kanningum hava vit netupp forðað fyri, at vit eru sárbær. Nú kunnu vit við góðari samvitsku vísa slíkum pástandum aftur, tí onki hevur higartil víst, at samanhangur er millum aggressivitet og kyksilvur. Men tað fara altíð at vera slík »Free-Willy« fólk, ið brúka gransking sum best ber til, tí tey renna onnur ørindi, sigur Pál Weihe.

Í fyrstu syftu hevur Pál Weihe ongar ætlanir um at venda sær til Ugeskrift for Læger við einari rættleiðing. Men hann fer at skriva til Claus Hancke persónliga og biða hann útgreina tað, sum hann sigur. Hinvegin óttast hann ikki fyri, at læknar taka greinina fyri fult.

– Læknar fáa beinanvegin illgruna um, at alt ruggar ikki rætt í hasi greinini. Tú skalt ikki hava lisið nógv, áðrenn tú sært, at hatta er langt undir vanliga støðið, sigur Pál Weihe.

# Kyksilvurið var bara eitt alibi

**Tað er neyvan samanhangur millum atferðina hjá føroyingum og grindadráp, viðgongur nú Claus Hancke, serlækni, sum annars hevur víst á hetta í eini grein í Ugeskrift for Læger. Men tað er eitt gott alibi fyri danskarar, sum skammast at vera í ríkisfelagsskapi við føroyingum, heldur hann**

GRINDADRÁP
*Ingi Rasmussen*

Føroyingar eru aggressivir og drepa grind, tí teir hava so nógv kyksilvur í blóðinum, segði Dr. Richard Fischer á einari stórari læknaráðstevnu í USA fyri einum mánaði síðan.

Richard D. Fischer er fyrrverandi forsiti í International Academy of Oral Medicine and Toxicology. Tað hevur enn ikki eydnast Sosialinum at fáa samband við Dr. Richard Fischer, men vit hava fingið orð á danan, Claus Hancke, sum hevur endurgivið orðini í Ugeskrift for Læger.

Høvuðsevnið á ráðstevnuni í Washington D.C. var krabbamein, sigur hann, men onkrir fyrilestrar snúði seg um evnið neurotoxicitet, sigur Claus Hancke, sum ikki minnst heitið á ráðstevnuni. Í tí sambandi varð sagt, at kyksilvur ávirkar sinnið. Fyri at prógva tað vísti Dr. Fischer føroyskt grindadráp.

Á ráðstevnuni vóru læknar frá øllum heiminum og fleiri teirra grótu, sigur Claus Hencke, sum sjálvur er serlækni í almennum medisini. Claus Hancke, sum er í feriu, sigur seg ikki minnast akkurát, hvørji prógvini vóru fyri pástandinum hjá Dr. Fischer. Spurdur, um hann í fullum álvara sum lækni heldur, at kyksilvurið í føroyingum er orsøk til,at føroyingar eru aggressivir og drepa grind, svarar hann:

– Eg meini tíverri ikki, at tað er kyksilvurið, sum er orsøk til, at føroyingar uppføra seg soleiðis í grindadráp, og eg meini heldur ikki, at tað er grundin til, at teir halda fast við grindadráp sum ritual. Og eg havi heldur onga meining um, at føroyingar eru harðrendari enn onnur fólk. Tað havi ongar fortreyt fyri at døma um, sigur hann og dregur sostatt eitt sindur í land frá greinini í Ugeskrift for Læger.

Eingin føroyingur var á ráðstevnuni, og helst var tað orsøkin til, at eingin talaði at ógvuliga ivasomu vísindaligu niðurstøðuni hjá serfrøðinginum. Men hóast hann eftir øllum at døma ivast í vísindaligu niðurstøðuni hjá Dr. Fischer, so setti Claus Hancke ikki spurning við hana. Sambært danska læknanum var tað ein lætti, at fyrilestrarhaldarin helt samband vera millum kyksilvur og grindadráp.

– Tað gav føroyingum eitt alibi fyri teirra primitiva atburð í sambandi við hetta groteska ritualdráp. Eitt alibi, sum flutti tankarnar hjá áhoyrarunum frá, at føroyingar kundu vera meira primitivir enn onnur siviliserað fólk. Eitt alibi, sum umbar ta primitivu og harðligu atferð, sum er í sambandi við grindadráp. Tað krøktu vit okkum í og brúktu sum alibi fyri at vera í ríkisfelagsskapi við hetta fólk. Føroyingar átti at hildið seg ov góðar til grindadráp í ár 2003, sigur Claus Hancke.

> “ *...for at demonstrere hvorledes kviksølv kan ændre vor psyke og specielt skabe aggressic adfærd, viste han en videofilm af færingernes voldelige adfærd under et grindedrab. Han mente, at den høje kviksølvophobning var årsag til, at man ikke havde mental kapacitet til at få afskaffet dette urgamle offerritual.*
>
> Claus Hancke, Ugeskrift for Læger, 14. juli

## Djóralæknin mótmælir

**Eitt mótmæli er nú komið frá almennari føroyskari síðu til greinina í Ugeskrift for Læger um føroyskan atburð í grindadrápi. Leiðandi djóralækni á Heilsufrøðiligu starvsstovu førir pennin**

GRINDADRÁP
*Ingi Rasmussen*

Heilsufrøðiliga starvsstova mótmælir nú greinina um grindadráp, kyksilvur og atferð føroyinga, sum Claus Hancke skrivar í Ugeskrift for Læger 14. juli. Í einum rættiliga persónligum aftursvari setir Peter Østergaard fleiri perspektiverandi spurnartekn við niðurstøðurnar hjá danska læknanum.

Sum djóralækni ivast Peter Østergaard í, um tað er meira menniskjaligt at eta høsna-, svína- og neytakjøt enn grind. Hann vísir á samlaðu líðingarnar, sum hesi framleiðsludjór mugu ígjøgnum, líka frá tey verða tikin frá mammuni, gjøgnum uppvøksturin í hørðum og strongdum ídnaðarfjósum og til mangan longu ferðina fram til slaktið, ið »humant« fríar djórini frá meiri ræðuleikum.

»Ud fra dette burde vi faktisk alle leve af kød fra grindehvaler«, skrivar Peter Østergaard, sum eisini undrast á, at Claus Hancke uttan kritiskan sans glaðbeintur góðtekur pástandin um, at føroyingar eru meiri harðligir enn onnur fólk, tí vit hava meiri kyksilvur í blóðnum.

»Med adskillige års erfaring fra et liv blandt færinger, kan jeg nævne op til flere nationers befolkninger, der efter denne nye avancerede aggressions-målestok, må ligge med et betydeligt væsentligt højere kviksølvtryk, end den færøske«, sigur Peter Østergaard í brævinum, ið er sent Ugeskrift for Læger. Brævið kann lesast í fullari longd aðrastaðni í blaðnum.